SUNDALAGSMENN VÓRU STINNARI Á GRÚSVØLLINUM

Við tveimum málum – einum í hvørjum hálvleiki – var EB/Streymur omaná, eftir at hava tikist við lorvíkingar í 90 minuttir

2. deild menn:
EB/Str-LÍF 2-0 (1-0)

Líkindini til fótbóltsspæl vóru ikki tey bestu á vøllinum í Streymnesi leygardagin. Fitt av vindi var, og tað órógvaði liðini í teirra roynd, at fáa líkinda spæla burtur úr dystinum.

Men trý stig vóru at spæla um, og tá teir 90 minuttir vóru lidnir, vóru tað vertirnir, sum vóru omaná og fingu vaska 5 fylgjandi tap í steypakappingini av talvuni.

Fyri EB/Streym, sum hini 2. og 3. deildarliðini í bólkaspælinum í, er steypakappingin fyrst og fremst góð venjing og eitt stóra avbjóðing. Tað sum telir hjá bæði EB/Streymi og LÍF er landskappingin, og fyrsta umfarið vann EB/Streymur, meðan LÍF enn einaferð mátti noyðast við tap, einki stig og einki mál.

Í fyrra hávleiki hevði LÍF undanvind, men tað vóru sundalagsmenn sum skoraðu.

Høgni Vesturdal setti høvdið undir eitt innlegg og bólturin fór fram við Jørgeni Andreasen í LÍF-málinum.

Í seinna hálvleiki økti Dánial Magnussen, sum fekk fatur á longum bólti og sendi í LÍF-málið til 2-0 til EB/Streym.

Bæði liðini høvdu málmøguleikar seinna umfarið, men hvørgum eydnaðist at gera fleiri mál.

Endin var tí, at EB/Streymur var stinnari á grúsvøllinum í Streymnesi og tryggjaði sær ein fyrimun eftir fyrsta umfar í landskappingini – og eftir øllum at døma høvdu teir fingið meira burtur úr steypakappingini enn lorvíkingar.

Dysturin kundi tó ikki geva eina greiða ábending um, hvussu væl liðini eru fyri, tí bæði vøllurin og veðrið forðaði fyri tí.

(ek)

YVIRVÁG Í EIN TÍMA VAR IKKI NOKK HJÁ KÍ TIL AT VINNA MÓTI B36

KÍ spældi spældi sannførandi í 60 minuttir og hevði kjansir til at avgera dystin bæði væl og virðiliga. Seinasta partin av dystinum kom B36 nógv meira við, og tryggjaði sær eitt stig

Rógvi Larsen

Vart tú í Klaksvík sunnudagin, og sást dystin millum KÍ og B36, vildu tú mett at talan var um veruligan toppdyst ella eina steypafinalu.

Við nógvari ferð, skjótum og neyvum bóltflytingum, nógvum nærdystum og mongum møguleikum, spældu klaksvíkingar fyrsta tíman sera væl. Men so sá út sum um teir møddust og luftin fór úr ballónini. Eftir hetta tóku gestirnir yvir spælið, og seinasta hálva tíman av dystinum trýstu teir klaksvíkingar aftur a vøllin, og kundu, um eydnan var við teimum, eisini avgjørt dystin.

STÓRSPÆL

B36 byrjaði annars dystin varliga, og leiktu ógvuliga verjukent. Útgangsstøðan bendi eisini á, at teir spældu uppá, at í hvussu er, at fáa eitt stig suður aftur við sær til Havnar. Jørgin Meitilberg var einsamallur áleypari, meðan Gunnari Nielsen leikti sum álopskendur miðvallari.

Klaksvíkingar, harafturímóti, vístu týðuliga, at teir vildu hava øll trý stigini. Fyrsta tíman sýndu teir eisini veruligt stórspæl. Leikararnir fluttu seg nógv og skilagott fyri hvør øðrum. Bólturin ferðaðist skjótt og væl millum leikararnar, og til tíðir endaði góða samanspæli við líkinda málmøguleikum, uttan tó at hesir vóru serliga vandamiklir.

Men í 23. minutti gav harða trýstið úrslit. Harley Bertholdsen gerst leysur í høgru síðu og sendir bóltin móti málinum hjá B36. Innleggið rakar B36 verjuleikara, og bólturin støkkur út aftur til Harley, sum enn einaferð leggur bóltin flatt innfyri. Kurt rívur seg leysan av uppdekkaranum, tveitur seg skerflatan og drønstútar bóltin í netið, uttan møguleika hjá Egin Høgnesen í B36 málinum at bjarga. Frálíkt mál og fult uppiborin KÍ-leiðsla.

FLEIRI MÁLMØGULEIKAR

Løtuna eftir málið dovnaði spælið hjá klaksvíkingum nakað, og gestirnir komu betur við. Serliga miðvøllurin hjá B36, við landsleikarunum Julian Johnson og Óla Johannesen umframt fyrrverandi HB'aranum John Hera Dam, leikti væl og trygt. Sjálvt um allir omanfyrinevndu eru ungir, hava teir kortini royndirnar og dirvið at leika sum "garvaðir" fótbóltsleikara.

Seinastu løtuna av 1. hálvleiki fann KÍ stevið aftur, og trýsti á gestirnar øktist aftur, og høvdu klaksvíkingar verið meir neyvir og avgjørdir í týðandi løtunum – og kanska eisini hepnir – so høvdu teir fingið okkurt málið. Tí einu ferðina høvdu teir einar 5 royndir í sama álopið á málið hjá B36, áðrenn Tummas Eli Hansen, fekk beint bóltin út til horna. Eisini mundi Eyðun Klakkstein skorað, tá hann – skreiðandi – fekk fótin á innlegg frá Arnoldi Joensen, men Egin fekk bjarga skotinum til horna, og báðir Mørkøre-brøðurnir og Harley Bertholdsen høvdu eisini royndir móti B36-málinum.

Næskastu royndirnar hjá B36 í 1. hálvleiki stóð Jørgin Meitilberg fyri. Báðar ferðirnar við skotum frá brotsteigsmarkinum. Fyrru ferðina rakti skotið verjuleikara, og skifti rætning, men málverjin hjá KÍ, Gunnar á Steig, fekk kortini bjarga bóltinum. Seinnu ferðina streyk bólturin framvið stólpanum.

B36 YVIRVÁG

Fyrsta korterið av øðrum hálvleiki byrjaði KÍ har, sum teir sleptu. Teir herjaðu á B36 málið, og høvdu eisini fleiri vandamiklar royndir, men eydnan var ikki við teimum.

Ístaðin tók B36 yvir, og tá 20 minuttir vóru farnir eydnaðist tað teimum at javna. Jørgin Meitilberg slítur seg leysan í høgra borðið. Rekur framvið Jóannesi Jacobsen, og skjýtur móti málinum. Gunnar hálvbjargar skotinum, og bólturin trillar fyri føturnar á Óla Johannesen, sum beinir hann seinasta strekkið í málið.

Tað, sum var eftir av dystinum, var meira eitt trýst á KÍ-málið enn øvugt, uttan tó at teir heilt nógvu vandamiklu møguleikarnir spurdust burturúr.

Stutt fyri dystarlok kundi Kurt Mørkøre havt avgjørt dystin, tá hann úr stuttari fjarstøðu stútaði bóltin móti málinum. Men í røttum Schmeichel stíli eydnaðist tað Egini at bjarga og harvið tryggjaði, at KÍ ikki fór avstað við øllum trimum stigunum, í einum dysti, sum man verða ein tann besti, sum er leiktur í Klaksvík í langa tíð.

TUMMAS ELI NØGDUR, JÓANNES BERT PARTVÍS

Tummas Eli Hansen segði eisini eftir dystin, at teir vóru fyrst og fremst farnir inn at varðveita tað stigið, sum teir høvdu áðrenn dystin.

– Tað eydnaðist, sjálvt um trýstið frá klaksvíkingum var hart. Men høvdu vit havt eydnuna við okkum, kanska serliga seinastu løtuna av dystinum, kundu vit eins væl fingið øll trý stigini. Tað hevði kanska verið órættvíst, men ikki ómøguligt, segði liðskiparin hjá B36.

Spælandi venjarin hjá KÍ, Jóannes Jakobsen, var eisini partvíst nøgdur við dystin.


– Vit spældu fantastiska væl í fyrra hálvleiki og eisini sannførandi í fyrsta korterið av seinna. Vit skuldu havt agjørt dystin langt áðrenn B36 fekk javna.

– Vit brúktu nógva orku,og fingu rokningina seinni í dystinum. B36 yvirtók og kundu havt vunnið, um teir vóru hepnir. Men samanlagt høvdu vit uppiborið sigurin, og kendu vit okkara vitjunartíð, so vunnu vit eisini.

– Tað var ikki sum onkur vildi vera við ein køvisligur dystur. Dysturin var óvanliga væl spældur til at vera fyrsti dystur í kappingini, segði Jóannes Jakobsen.

Jørgen Meitelberg var vandamikil í B36-álopinum. Her roynir Allan Joensen hjá KÍ at steðga honum





Mikkjal Thomasen hjá HB og Jan Petersen hjá B68 dystast um bóltin

UNDIRHALD Í EIN HÁLVLEIK

HB kundi og átti at havt avgjørt dystin í 1. hálvleiki

Árini frammanundan hevur tað ofta verið soleiðis, at dystirnir millum HB og B68, altíð hava havt ein ávísan spenning og dám yvir sær, við góðum spæli og fleiri málum og málmøguleikum. Men soleiðis varð ikki hesaferð - í hvussu er ikki í 2. hálvleiki.

-Tað góða og skjóta spæli, hesi bæði liðini plaga og kunna standa fyri, var ikki ofta at síggja. Og tær ferðirnar teir spældu seg til málmøguleikar, vóru leikararnir ov lítið avgjørdir og royndirnar gjørdust tískil alt ov forkølaðar. Av somu orsøk kom ongantíð rættuligur spenningur í dystin, og liðini bæði virkaðu, tá ið samanumkom, at vera nøgd við javnleik, sjálvt um havnarmenn áttu at havt at avgjørt dystin í 1. hálvleiki.

Kann verða at ikki serliga góða spæli og fáu flytingarnar skuldast, at talan var um fyrsta landskappingardystin í árinum, og leikararnir kanska enn ikki eru komnir í røttu venjingarstøðuna. Hetta er kortini ikki nøkur umbering, tí flestu 1. deildarfeløgini hava longu nú vant í minst tríggjar mánaðir um ikki meira.

Annars vóru tað toftamenn sum byrjaðu betur, og trýstu HB-liðið nakað. Hetta varði kortini bert lítla løtu. So tóku havnarmenn yvir, og trýstu tað sum eftir var av hálvleikinum. Til tíðir vístu teir eisini heilt gott spæl, og spældu seg til fleiri góðar málmøguleikar.

Serliga var tað Uni Arge sum var vandamikil og hevði onkra royndina, sum, við eitt sindur størri hepni, hevði givið mál, og kanska enntá hevði broytt dystargongdina nakað. Í tí ein førinum rakti Uni stólpan, og løtu seinni var hann leysur við Kjartani Nesá, men Kjartan bjargaði frágera væl skotinum.

LÍTIL B68-YVIRVÁG

Tað gjørdist ikki lættari hjá gestunum, tá ið nýggi og einasti landsliðsmaðurin hjá teimum, Hans Fróði Hansen, noyddist út við skaða stutt fyri hálvleik. Í hansara stað kom Jákup Djurhuus.

Yvirvágin hjá heimaliðinum í fyrra hálvleiki, vendist til lítla B68 yvirvág í seinna. Men teir megnaðu at skapa sær tær nógvu vandamiklu málroyndirnar.

Fyri tað mesta gekk spælið fyri seg á miðjum vølli og fram ímóti báðum brotsteigunum. Størsta B68 møguleikan, og kanska eisini tann størsta í dystinum, fekk skjóti og vandamikli áleyparin Páll Didriksen miðskeiðis í hálvleikinum, tá hann gjørdist leysur við Kaj Leo Johannesen. Men Kaj Leo bjargaði skotinum frá Pálli, og so spurdist ikki meira burturúr tí royndini.

Tann besti málmøguleikin hjá HB í 2. hálvleiki, kom eftir frísparkskombinatión, ímillum Rúna Nolsøe, Andreas F. Hansen og Una Arge, men skotið frá seinast nevnda fór framvið Kjartani og málinum.

Samanumtikið, eitt úrslit, sum toftamenn í hvussu er skulu verða nøgdir við, meðan havnarmenn kunnu takka sær sjálvum fyri, at teir ikki fingu trý stig í hús.

VANDAMIKIÐ ÁLOPSPAR

Suni Reinert og Bogi Midjord vóru størsta hóttanin hjá HB í dystinum móti B68

2. deild menn:
B68-HB 2-3 (2-2)

Dysturin á Svangaskarði leygardagin millum uppflytararnar B68 og vinnararnar av 2. deild í fjør, HB, var javnur.

Leikarahópurin hjá heimaliðnum var væl kryddaður. Onkrar fyrrverandi B68-stjørnur, onkrir leikarar sum hava verið á 1. liðið í ár, og so onkrir ungir framtíðarleikarar vóru á liðnum. Havnarmenn, við Oddbirni Joensen á odda (leikandi venjari), vóru serliga mannaðir við ungum og evnaríkum leikarum, sum, um ikki langa tíð, óivað sleppa at royna seg á besta liðnum.

Líkindini at leika fótbólt vóru einki serlig. Nógvi vindurin darvaði spælinum nakað, sjálvt um liðini – kanska serliga HB – royndu at spæla sínamillum spæl, við skjótum flytingum og neyvum avleveringum.

Tá 5 minuttir vóru farnir av dystinum, løgdu toftamenn seg frammum við frísparksmáli sum Øssur Jacobsen (skjótur og vandamikil í vinstru) skeyt beinleiðis í netið úr 20 metrum.

Lítla løtu seinni javnaði álopsleikarin Bogi Midjord (støðug hóttan móti B68-verjuni), tá hann fekk bóltin av verjuleikara og skeyt framvið Allani Joensen í B68-málinum.

Í SÍÐSTU LØTU

Tá góður hálvur tími var farin kom B68 aftur fram um. Innlegg úr høgru síðu frá Dan Hansen endaði hjá Petur Gaardlykke, sum, staddur mitt frammanfyri málinum, hálvfluktaði bóltin í kassan, uttan møguleika hjá Martini Petersen at bjarga.

Lítla løtu seinni javnaði Høgni Hansen. Eitt-tvey spæl millum Regin Reinert og Høgna í vinstra borði, endaði við, at Høgni, í aðru atløgu - liggjandi!! - prikaði bóltin innum mállinjuna.

Fyrstu løtuna av 2. hálvleiki øktist trýstið á B68 verjuna. HB hevði nú vindin undan, og spældi seg til fleiri møguleikar. Serliga vóru tað teir báðir álopsleikararnir hjá HB, Suni Reinert og Bogi Midjord, sum vóru vandamiklir.

Fyrsta stóra møguleikan høvdu gestirnir, tá Bogi fór framvið trimum B68 leikarum í vinstru. Komin til baklinjuna spældi hann útfrá til Una Mortensen, sum skeyt ímóti málinum, men verjuleikari bjargaði skotinum á mállinjuni.

Tá okkurt um 10 minuttir vóru leiktir eydnaðist tað HB, fyri fyrstu ferð í dystinum, at leggja seg framum. Aftur hesaferð var tað Høgni sum skoraði, og aftur hesaferð, var tað Regin Reinert, sum átti avgerandi avleveringina. Regin lyfti bóltin uppum B68 verjuna til Høgna, sum – hart kroystur av verjuleikara – helt høvdið kalt, og sendi framvið Allani.

Seinasta korterið av dystunum spældi B68 seg til fleiri møguleikar. Tann størsti mundi falla Olafi Højgaard í lut ein minutt fyri leiklok, men skotið frá honum brast í stólpan og bólturin støkk aftur í spælið.

rl

FS VÁGAR FEKK EINA YNSKIBYRJAN

Gjørdu sigurmálið tríggjar minuttir fyri leiklok, eftir at Skála leingi hevði trýst

1. deild menn:
Skála-FS Vága
r 1-2 (1-1)

Uppflytingarliðið Skála tók á heimavølli leygardagin ímóti 2. liðið hjá samansetta felagnum úr Vágum, FS Vágum. Dysturin var ikki serliga væl spældur. Nógvi vindurin gjørdi nevnliga sítt til, at líkindini at spæla fótbólt vóru út av lagi vánalig.

Gestirnir, sum høvdu vindin undan í 1. hálvleiki, høvdu bóltin mest, men vóru sjálvdan rættuliga vandamiklir frammanfyri málinum. Kortini vóru tað teir sum fingu fyrsta málið, longu tá 6 minuttir vóru farnir.

Robert Bernhardson fangaði langa avlevering frá viðleikara um brotsteigsmarkið hjá Skála. Hann dróg tvørtum, og ímillum vinir og fíggindar sendi hann hegnisliga bóltin framvið málverjanum hjá Skála.

Skálamenn fullu kortini ikki í fátt av hvøkkinum. Tá okkurt um eitt korter var farið, eydnaðist tað teimum at javna. Verjuleikari hjá FS Vágum var óansin við afturlegging, og Kaysten Rasmussen kom ímillum og skeyt úr stuttari fjarstøðu avgjørdur bóltin framvið málverjanum hjá gestunum, Jóhan á Mýruni.

Í seinna hálvleiki vendist í holuni, og var tað nú heimaliðið sum trýsti, meðan vágamenn lógu afturi á vøllinum og dúvaðu uppá mótálop. Kortini megnaðu skálamenn ikka at umseta yvirtakið til nógvar vandamiklar møguleikar. Tær ferðirnar hetta eydnaðist, vóru teir alt óneyvir og ov lítið avgjørdir ella eisini tók Jóhan á Mýruni sær av royndunum.

Tá góðir 3 minuttir vóru eftir at leika, var tað ístaðin FS Vágar sum fekk mál. Mótálop endar við, at fríspark verður dømt stutt uttanfyri brotsteigin hjá Skála. Málverjin hálvbjargar skotinum. Kim Poulsen er skjótur, fylgir upp og sendir bóltin tvørturum til ein púra leysan Egil Petersen, sum ikki kann gera annað enn takka fyri, og senda bóltin í tóma málið.

Skálamenn royndu alt tað teir vóru mentir – um ikki at vinna – so í hvussu er at javna.

Nakrar royndir høvdu teir, men kortini eydnaðist teimum ikki at fáa mál.

Sostatt fingu vágamenn ein ynskibyrjan á kappingarárið við at vinna fyrsta dystin - enntá á útivølli.

(rl)